TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogur/hjálparfólk

**Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi, 20-40 tímar um vikuna, til "Margarinfabrikkina - Virkishús fyri Børn og Ung"**

**Margarinfabrikkin** er eitt frítíðar- og virkishús fyri størri børn (8-12 ár) og ung (13-19 ár).

Opið er gerandisdagar frá kl. 13.00-17.30 fyri børnum og kl. 18.00-22.00 fyri ungum.

Kvøldvaktirnar verða býttar soleiðis, at tað verða 1-2 kvøldvaktir um vikuna.

**Margarinfabrikkin** er framvegis í støðugari menning, og roynt verður at fylgja við menningini og tí nýggja rákinum, ið rørist ímillum børn og ung. Samstundis verður roynt at geva teimum ábyrgd og samávirkan til virksemið í húsinum.

**Vit vænta**
at umsøkjarin:

- er áhugaður í at arbeiða við størri børnum og ungum
- er opin, vísir ábyrgd og er positivur
- hevur áhuga fyri skapanarevnum/ er skapandi
- er fyrikomandi og kann arbeiða sjálvstøðugt
- vísir virðing fyri sínum medmenniskjum

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

**Meria fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Henrik Andersen, tlf. 31 22 17, millum kl. 13-18, ella Katrina Petersen, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 28. september 2001 kl. 12.00. Viðmerk á umsóknina "Pedagogur/hjálparfólk til Margarinfabrikkina".

SNARSKIVAN

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Evnislestrar um arbeiðsmarknaðar-viðurskiftir

*Hvussu verður søkt um barsilspening?*
*Hvørjar vanlukkutryggingar hevur virkið hjá mær skyldu at hava?*
*Hvussu fær mítt virkið ein lærling?*
*Er tað nakað, sum eitur hvíldartíð?*

**Svarini fært tú hósdagin 4. oktober 2001 á Hotel Føroyum.**

Vinnuhúsið skipar 4. oktober 2001 fyri evnislestrum um arbeiðsmarknaðarviðurskiftir. Millum annað verður greitt frá arbeiðsmarknaðarlógum og teimum lógarbroytingum, sum eru framdar innan økið farna árið.

Á skránni er:

**Barsilsskipanin** v/ Anniku Mikkelsen, málsviðgera, Barsilsskipanin: Hvørji rættindi og skyldur hava ávíkavist løntakarin og virkið? Hvussu søkir tú um barsilspening?

**Dagpeningalógin** v/ Petru Joensen, stjóra á Almannastovuni, Anne Djurhuus, deildarleiðara og Joan Hendrik S. Samuelsen, løgfrøðing: Nær hevur løntakarin rætt til dagpening, og hvussu er mannagongdin, tá ið tú søkir um um dagpening? Greitt verður frá innihaldinum í lógini.

**Vanlukkutryggingar** v/ Niels Juul Akraberg Poulsen, deildarstjóra, Tryggingarfelagið Føroyar: Greitt verður millum annað frá lógarkravdu vanlukkutryggingunum.

**Arbeiðsumhvørvið** v/ Virgar Hvidbro, kunningarleiðara, Arbeiðseftirlitið: Hvørji krøv verða sett til virkini í tí nýggju arbeiðsumhvørvislógini? Greitt verður millum annað frá trygdarskipanini, hvíldartíð og arbeiðið hjá børnum og ungum.

**Yrkisútbúgvingar** v/Petur Zachariassen, formanni í Yrkisútbúgvingarráðnum og Petur Oluf Hansen, fyrisitingarleiðara, Yrkisdepilin: Greitt verður m.a. frá viðurskiftunum millum lærling, virkið og skúla, hvussu eitt virkið fær ein lærling, og hvørji krøv skulu verða lokin.

Evnislestrarnir verða á Hotel Føroyum frá kl. 9.30 - 16.00 (morgunmatur fæst frá 9.00). Kostnaðurin er kr. 600,- fyri limir í húsinum og kr. 900,- fyri ikki limir. Íroknað prísinum er kostur og tilfar.

Tekning fer fram í Vinnuhúsinum á tlf. 31 18 64 ella á teldupostadressu: industry@industry.fo. Síðsta freist at tekna seg er mánadagin **1. oktober 2001.**

Sosialurin

## Vikarur

Søkt verður eftir vikari skjótast tilber til fult tímatal fyri lærara í farloyvi. Meira fæst at vita á tlf. 443234 ella 286935.

Møguligar umsóknir skulu sendast til:

**Leirvíkar skúli**
520 Skúli

## Fiskamerkir

Seinasta freist at lata fiskamerkir inn, sum skulu luttaka í lutakasti um 10.000 kr., er 28. sept. 2001.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
100 Tórshavn

## Ford Focus Ghia

- Motorur 1,600
- Fra december 1998
- ikki roykjarabilur



**Kostnaður kr 125.000**

Ring tlf 223369

## Eitt skeið fyri teg

Kom nú á skeið og lær teg sjálvan at kenna.

Steen Palmkvist, pyskoterapeut, vil leiða teg inn í ta ferfaldu gudsmyndina.

Skeiðið verður í Kirkju- og Missiónshúsinum á Argjum 22 september kl. 14.00-18.00.

**Diakonali bólkurin AGAPE**

## Frá Salong Finngerð Vestmanna

Sólin hevur fingið nýggj rør
5 min. á 10 kr.

**Salong Finngerð**
tlf. 424243

# ítróttur

Nr. 178 • leygardagur • 15. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

KÍ-B36:

# Tomislav vil ikki missa metið



*Síðani hann fór til Klaksvíkar, hevur Tomislav Sivic ikki spælt móti B36, men sunnudagin roknar hann við at vera á vøllinum*

**Hóast eitt FM-gull til B36 gevur KÍ eitt atgongumerki til Europa, so ætla klaksvíkingar ikki at lata gestirnar fara avstað við stigunum sunnudagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað hevur verið nógv tosað upp undan vikuskiftinum, um klaksvíkingar yvir høvur eru sinnaðir at geva B36 nakra mótstøðu, tá oddaliðið nú kemur á vitjan í Klaksvík.

Støðan í landskappingini er nevnliga so margháttlig, at KÍ við at geva B36 stigini kann hjálpa sær sjálvum til eitt atgongumerki í Europa. Hetta tí KÍ í steypafinaluni mátti lúta fyri B36.

### Vil ikki missa metið

Tíbetur sær tó ikki út til, at klaksvíkingar ganga í somu tonkum, sum fleiri áskoðarar – ikki minst í Gøtu – eru bangin um, og hetta hevur eisini fleiri orsøkir.

Fyrst og fremst er tað sjálvandi soleiðis, at tað ítróttarliga vildi verið blóðskeivt, um eitt lið fór á vøllin uttan at vilja vinna. Tað vilja klaksvíkingar neyvan hava sitandi á sær, og minnast skal eisini til, at klaksvíkingar við einum sigri kunnu skaffa sær eitt atgongumerki sjálvir. Gaman í verður hetta ikki til UEFA-Cup kappingina, men eitt Toto-pláss vil neyvan vera av vegnum í so máta.

Og so er tað sjálvandi tað við venjaranum. Tomislav Sivic var í trý ár venjari hjá B36, har hann millum annað fekk eitt meistaraheiti, og sjálvandi er hann sera spentur til uppávuna.

- Vit kundu ikki droymt um at lata stigini frá okkum uttan víðari, sigur hann.

- Um B36 ætlar sær at gerast føroyameistari, so skulu teir vinna her norðuri, men tann sigurin koma teir so ikki til uttan víðari, tí KÍ ætlar sær avgjørt at vinna.

Í Klaksvík hava tey annars alt fólkið tøkt til dystin, við undantakið av leikbannaða Fríðin Ziskason. Allan Joensen hevur verið nógv plágaður av skaðum, men hann ætlar so eisini at gera eina roynd at spæla. Sjálvur ætlar Tomislav sær eisini á vøllin hendan dystin, og hetta verður so fyrsta ferðin, at hann fer at royna seg ímóti fyrrverandi liðfeløgunum í Havn, og umframt at hetta helst økir spenningin fyri hansara viðkomandi, so hevur hann eisini eina aðra orsøk at taka stig frá B36.

- Eg eigi framvegis ein part í onkrum meti í føroyskum fótbólti. Í 1997 vunnu vit 16 dystir og fingu 48 stig, og hetta ætli eg ikki, at nakar annar skal fara avstað við, sigur smilandi jugoslavin at enda.

### Vænta onga gávu

Tað er nú ikki tí, at B36'arnir vænta sær nakran léttan dyst sunnudagin.

Tá vit hóskvøldið spurdu Jens Kristian Hansen, um hann helt at støðan hjá KÍ í mun til UEFA-Cup fótbólt hevði nakra ávirkan, var hann púrasta greiður.

- Tað kann eg ikki á nakran hátt droyma um. Eg eri ikki í iva um, at teir fara á vøllin at gera sítt ítarsta, og tað verða vit eisini noyddir til, um vit skulu gera okkum vónir um trý stig. Og tað skulu vit eisini hava, um vit skulu varðveita munin til GÍ, leggur hann afturat.

Jens Kristian sigur annars, at støðan við fólki í B36 er avbera góð undan vikuskiftinum. Eingir skaðar ella leikbann eru, so talan verður um eitt fullmannað B36 lið, har eisini Jákup á Borg er við. Hann hevur annars havt trupulleikar við at fáa frí frá skúlagongdini í Danmark, men hetta skuldi nú verið komið í rættlag.

# Ítrótt fordømir allan yvirgang

**Ítróttasambandið mælir til tøgn fyri at minnast tey óseku, ið doyðu í USA, samstundis sum ítróttafólk gera vart við andstygd sína mótvegis yvirgangi**

YVIRGANGUR &ÍTRÓTT
*Tíðindaskriv*

Hvørja lívs- og samfelagsáskoðan vit so enn hava, so kann eingin á nakran hátt taka undir við teimum illgerðum,, ið hava rakt USA. Neyðugt er, at vit øll , ið hava frið og frælsi sum ein náttúrligan part av lívi okkara, vísa okkara andstygd og fordøma tær valdsgerðir, sum 11. september kostaðu hópin av ósekum menniskjum lívið. Samstundis eiga vit at vísa teimum avvarðandi, amerikanska fólkinum og USA okkara samkenslu.

Ítrótt, ið byggir á vinarlag og friðarliga kapping millum fólk óheft av landamørkum, átrúnað og politiskari áskoðan, kann bert upp á tað harðasta fordøma slíkan yvirgang, ið hevur verið so nógvum ósekum fólki at bana. Tað er ikki nógv, vit kunnu gera fyri tey avvarðandi, men vit kunnu í øllum førum gera vart við andstygd okkara móti yvirgangi og yvirgangsatsóknum, sumstundis sum vit vísa semkenslu við teimum, ið hava verið fyri so álvarsligum hendingum og so meinum missi.

Tí vil Ítróttasamband Føroya heita á øll ser- og deildarsambond umframt øll ítróttafeløg um at byrja kappingar teirra í vikuskiftinum komandi við at halda tøgn í eitt minutt og í virðing minnast tey, ið ósek gjørdust offur fyri fyrilitarleysum mannavargum. Samstundis ber henda tangnarstund boð um, at vit venda okkum frá øllum yvirgangi.

*Vegna ítróttafólk, ítróttafeløg, deildir og sersambond*
**Ítróttasamband Føroya**
**Heðin Mortensen, forseti**

HB-EB/Streymur:

# Æran hjá HB skal bjargast

**Kreppan er enn ikki liðug í HB, men leikararnir tykjast uppsettir um at venda skeivu gongdini**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað eru nú hálvur triði mánaðir síðani, at HB seinast hevur vunnið ein landskappingardyst, og er hetta eindømi hjá sigursvanda havnarliðnum. Bæði leikarar og áskoðarar hava lagt rygg til hálva vegna eyðmýkjandi tap, men nú tykist ein glotti tó at vera fyri framman.

### Gunnar neyvan avsettur

Mikudagin tapti HB aftur, men meira enn úrslitið, so er tað helst stríðsviljin hjá leikarunum, sum áskoðararnir bitu merki í, og kann hesin varðveitast móti uppflytarunum, eigur HB helst at vera ført fyri at vinna sær stig.

Tað hevur ikki verið soleiðis í ár, at HB hevur alt fólkið tøkt til dystin,. og tað hava teir heldur ikki hesaferð. Í mun til dystin móti GÍ, er støðan á leið hin sama. Málverjin, Bárður Johannesen fekk skaða í teirri uppgerðini, og verður neyvan við sunnudagin, men hinvegin er navni hansara, Mortansson, við aftur, og so er spurningurin, hvussu Ion Geolgau velur at blanda álopskortini. Seinastu dystirnar hevur Gunnar Mohr verið partur av hesum, og hann verður so neyvan avsettur, eftir avrik síni.

### Allir klárir

Í samansetta liðnum tykist støðan at vera heilt góð. Liðið hevur havt sera góðan byrð seinastu vikuskiftini, og allir mans eru tøkir sunnudagin.

Spurningurin er so, um EB/Streymur aftur hesa ferð kann fella ein av fyrrverandi risunum í føroyskum fótbólti. Undanfarna vikuskifti stóð KÍ fyri skotum, og spurningurin er so, hvat fer at henda í Gundadali sunnudagin.